## Bora í Norðsjónum



Faroe Petroleum hevur gjørt avtalu við Bow Valley Petroleum um at keypa 10% av einum blokki, har tað í løtuni verður borað eitt stórt oljumið. Oljumiðið, sum eitur Fulmar L (Havhestur), liggur á einum øki, har fleiri oljukeldur eru. Nærhendis Fulmar L liggja Wood, Howe, Huntington og Cayley, har oljufelagið Talisman fyri stuttum fann olju. Mett verður, at enn fleiri møguleikar at finna olju eru á økinum. Brunnurin, sum skal borast liggur á 90 metra dýpi og er bert 3 km frá Forties rørleiðingini, 10 kilometrar frá Nelson og 18 km frá Montrose framleiðslueindini. Tað er boripallurin Transocean Prospect, og borikonsolent-felagið AGR, sum stendur fyri boringini. Hol var sett á 19. august, og væntandi tekur tað 46 dagar at bora brunnin. - Vit meta, at hetta er ein góður møguleiki, sum hóskar væl til ætlanirnar hjá Faroe Petroleum. Felagið hevur eina boriætlan har fleiri enn 20 brunnar skulu borast og fígging er tøk til allar brunnarnar. Í løtuni verða metingarbrunnurin Topaz og leitibrunnarnir East Breagh og Marsvin boraðir. Harumframt er ætlanin at bora ein leitibrunn og ein metingarbrunn á Hyme og South East Tor seinni í ár. Fram til ársenda væntast, at felagið luttekur í minst sjey brunnum, og er hetta ein sera spennandi tíð fyri Faroe Petroleum, sigur Graham Stewart, stjóri.

# Lív fingið atløgu í Vágsbotni

**Bjargingarbáturin Lív hjá Landsfelagnum fyri Bjargingarfeløg (LFB) hevur nú fingið sína føstu atløgu í Vágsbotni. – Okkum er víst stór vælvild frá øllum síðum, sigur umsjónarmaðurin, Jens Hansen**

LÍV

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Lív hevur nú fingið sítt fasta atløgupláss í Vágsbotni*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Næstsíðsta leygardag varð nýggja atløgan hjá bjargingarbátinum Lív løgd út í Vágsbotni.

- Vit hava fingið atløgu-plássið ókeypis frá Tórshavnar kommunu, og haraftrat hava vit fingið loyvi at brúka 12.000 kWh í streymi ókeypis um árið.

Tað sigur Jens Hansen, sum vegna LFB hevur umsjónina við bjargingarbátinum.

Hann vísir á, at teir sjálvir hava teknað atløguna, men at bjargingarfeløgini hava møtt stórari vælvild og hjálpsemi í hesum arbeiði.

- Vit hava fingið lutirnar til brúnna frá Vestlaks, og síðan hevur Tórshavnar Skipasmiðja sveisað brúnna saman fyri okkum. Alt timburarbeiði hava vit gjørt sjálvir – og sjálvboðið, sigur Jens.

Umsjónarmaðurin sigur, at teir settu fendararnar upp í gjár, og í dag hava teir fylt luft í hesar.

- Hetta er eitt nýtt slag av fendarum, sum vísa seg at rigga væl, leggur hann aftrat.

Jens Hansen sigur, at vegna LFB eru teir sera takksamir fyri vælvild og stuðul, nú Lív hevur fingið sína føstu atløgu í Vágsbotni.

### Fleiri uppgávur

Lív varð døyptur í Kollafirði 17. mai í ár, og longu á royndartúrinum ávegis úr Kollafirði til Havnar fekk báturin sína fyrstu uppgávu, sum var ein sjúkraflutningur úr Nólsoy til Havnar.

- Lív hevur havt fleiri uppgávur, síðan báturin kom til landið. Skipanin er hon, at fýra fólk eru knýtt at bátinum í senn, samstundis sum fýra onnur eru til at taka, um onkrum berst frá, tá útkall eru.

Jens Hansen sigur, at soleiðis eru fýra fólk í senn á forvakt – og fýra onnur á bakvakt, sum hann rópar tað.

- Tað er bara 112, sum er Alarmsentralurin og MRCC Tórshavn, sum kunnu kalla bátin út til uppgávur og teir, ið hava tilknýti til bátin, hava allir kallitól frá Tórshavnar Sløkkiliði.

Vit kunnu nevna, at tá hol kom á ísfiskatrolaran Falk á Sandoyarbankanum fyrr í summar, var Lív fyrstur av landi og út á skipið við pumpum. Tað var mjørkaveður, og tí kundi tyrlan ikki flúgva.

- Vit hava skilt, at fiskimenninir vóru sera fegnir um at síggja Lív so skjótan á leiðini. Tá báturin kom á leiðina, var støðan umborð á Falki undir eftirliti.

Eisini á ovastevnu, tá Lív var tøkur í samráð við samarittarnar hjá Reyða Krossi, hevði báturin ikki færri enn seks flutningsuppgávur, harav onkur var »kritisk«, sum umsjónarmaðurin tekur til.

### Væl nøgdir

Tað er Landsfelagið fyri Bjargingarfeløg, sum eigur Lív, ið hevur tveir scania motorar á 530 hk hvør. Báturin er um 12 metrar langur og vigar heili 13,5 tons.

- Vit eru sera væl nøgdir við bátin, og nú heystið og veturin stunda til, eru vit spentir eftir at síggja, hvussu báturin fer at roynast í verri líkindum, sigur Jens Hansen.

Málið hjá LFB er, at bjargingarfeløgini kring landið skulu hava meira enn henda eina bátin, og skipanin við hesum fyrsta bátinum er, at bjargingarfeløgini í Havn, Kollafirði og Nólsoy standa fyri rakstrinum.



*Edvard Kjeld hevur maskinellu ábyrgdina av bjargingarbátinum Lív*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Gamal línubátur fiskaði fyri 24 mió

**Norski línubáturin Torita I, sum er smíðaður í 1978, fiskaði í fjør fyri 24 miljónir norskar krónur**

FISKIVINNA

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Línubáturin Torita I úr Ellingsøy í Noregi man vera kendur av fleiri føroyingum. Báturin, sum er slakar 40 metrar langur, er smíðaður í 1978 og umbygdur í 1983.

Í fjør fiskaði Torita I fyri heili 24 miljónir norskar krónur, sum má sigast at vera eitt stórt tal.

Í ársroknskapinum sigur felagið, sum eigur skipið, at tað er eitt minni skipsreiðarí í Ålesund kommunu, sum eigur Toritu I.

Hýsu-og toskakvotan hjá línubátinum í ár er ávikavist 181 og 217 tons. Haraftrat kann skipið fiska frítt eftir eitt nú brosmu, longu og steinbíti.

Raksturin av Toritu I gav í fjør eitt avlop upp á tilsamans 2,4 miljónir norskar krónur.

Til samanburðar kann nevnast, at besti línubáturin í føroyska fiskiskipaflotanum í fjør - Klakkur - fiskaði fyri einar 17 miljónir krónur í okkara peningi.

Tað er FiskeribladetFiskaren, sum ber tíðindini um Toritu I á síni heimasíðu.



*Fleiri føroyingar hava verið við Toritu I, sum hevði eitt gott ár í fjør*
*Mynd: FiskeribladetFiskaren*